# Bilar

Nr. 38 • hósdagur • 24. februar 2005 • 79. árg.

# Nýggjur og størri Skoda Octava




*Frits Dam Jacobsen frá Norðbil við nýggja Skoda Octavia, ið nú komin í aðru generatión*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Octavia, ið var fyrsti nýggi Skoda eftir at VW konsernin yvirtók kekkisku bilverksmiðjuna, er nú komin í aðru generatión.**

## Skoda Octavia 1,6 Ambiente

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litur 4 syl. bensin 102 hk |
| 0-100 km/t: | 12,3 sek |
| Bensinnýtsla: | 13,9 km/l |
| Dekkstødd: | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 457,2 cm |
| Breidd: | 176,9 cm |
| Hædd: | 146,2 cm |
| Eginvekt: | 1.255 kg |
| Viðførisrúm: | 560 litrar |
| Prísur: | kr. 225.750,- |
| Søluumboð | Norðbil<br>Oyggjarvegur<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313707<br>www.nordbil.fo |

**Bilurin er størri og rúmligari enn forgangarin, ið kom á marknaðin í 1996**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Skoda Octavia er bilurin, ið broytti umdømið hjá Skoda. Eftir umleið tíggju árum telist Skoda nú millum bæði firma og stjórabilar sum t.d. tann størri Skoda Suberb, ið er ein stórur luksusbilur.

Hóast nýggi Octavia líkist nógv forgangaranum, er talan um ein størri og rúmligari bil, sum tó er gjørdur eftir sama konsepti. Bilurin er bæði longri og breiðari við størri aksilfrástøðu.

Eins og forgangarin sær hesin út sum ein vanligur sedan, men við stórari baklúku sum ein liftback. Viðførisrúmið er vaksið frá 528 til 560 litrar.

Koyrieginleikarnir eru góðir og elektromekaniska servostýringin og fjaðraskipanin eru við til at gera bilin sera stúttan eitt nú í svingum.

### Ambiente og Elegance

Tveir bensin og tveir dieselmotorar eru at velja ímillum, bensinmotorarnir eru: 1,6 litur við 102 hk, og 1,6 litur FSI við 115 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,9 TDI við 105 hk og 2,0 TDI við 140 hk.

Octavia fæst í útgávunum Ambiente og Elegance. So gott sum øll trygdarútgerðin er standard sum t.d. 6 airbag, antispinn, bremsuassistentur, ESP, el-síðuspegl v.hita, el-síðurútar, ferðpilotur og hiti í forsetrunum. Bilurin fæst við nógvari eykaútgerð, sum kann bestillast eftir egnum ynski.

Bilurin fær sera góð ummælir frá motorjournalistum. Danska bilblaðið "Nyt om biler" hevur kosið Octavia "Bedste Firmabil". FDM limablaðið Motor sigur um Octavia "Vi gik bilen igennem på et FDM testcenter og kunne konstantere, at den forebyggende rustbeskyttelse er blandt de bedte, vi har set"

Skoda Octavia fæst eisini sum Combi (stationcar). Bíligasti Octavia kostar kr. 225.750,-

## Stórur eftirspurningur eftir Mini



Eftirspurningurin eftir Mini er framvegis munandi størri enn framleiðslan, verður upplýst frá BMW. Framleiðslan í 2004 var 184.000 bilar, meðan eftirspurningurin var 200.000 bilar, sum framleiðslan verður økt til í ár

*Kelda: Motor Magasinet*

## Volvo við sótfiltrum



Volvo koma í vár við sótfiltrum til dieselútgávurnar av S60, V70, S80 og XC70. Volvo S40 og V50 hava fingið sótfiltur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai og Kia



Koreansku Hyundai og Kia bilarnir skulu í framtíðini verða meira ólíkir, enn teir eru í dag, verður upplýst frá Hyundai, sum saman við Kia er 7. størsti bilframleiðari í heiminum. Ætlanin er, at teir skulu verða nummar fimm áðrenn 2010

*Kelda: Motor Magasinet*